# Molde skal spenna reimina

**Men Jákup Mikkelsen roknar við, at hann verður í felagnum sambært galdandi sáttmála inntil í heyst**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Tað stendur einki til í Molde. Ikki soleiðis at skilja at fótbóltsliðið ikki er klárt at fara undir nýggja kappingarárið. Men heldur er tað í fíggjarliga partinum, at skilið ikki er so gott.

Kjell Inge Røkke hevur verið fíggjarliga trygdin síðstu árini, og tað er hann framvegis. Fyri góðum tveimum árum síðani skrivaði Røkke sáttmála við Molde. Milliarderurin bant seg til at rinda felagnum 20 milliónir um árið í fimm ár. Ta avtaluna – at rinda felagnum tilsaman eitt hundrað milliónir krónur í fimm ár – ætlar Røkke at halda seg til. Men kortini hevur hann reist uggafjarðarnar so mikið, at teir í fótbóltsfelagnum kenna seg noyddar at spara.

Veruleikin er tann, at Molde FK hevur brúkt nógv meiri pengar, enn teir hava havt inntøkur at gjalda við. Í fyrraárið brúktu teir tíggju milliónir ov nógv, og í fjør brúktu teir sjey milliónir ov nógv. Bæði árini hevur Røkke tett holini, umframt at hann hevur rindað tað, sum hann í sáttmálanum hevur bundið seg til.

Nú hevur Røkke boðað felagnum frá, at hann ikki eina ferð afturat ætlar sær at spæla eyka jólamaður. Felagið fær 20 milliónir í ár og so ikki eina krónu afturat. Tað er hetta, sum er orsøkin til, at leiðslan í felagnum nú kennir seg noydda at skerja útreiðslurnar.

Samlaðu útreiðslurnar sigast vera umleið 50 milliónir. Felagið megnar sjálvt at fáa 25 milliónir til vega í inntøkum, og so fær tað milliónirnar frá Røkke. Tað vil við øðrum orðum siga, at um útreiðslustøðið verður, sum tað hevur verið, so verður talan í ár um eitt rakstrarhall upp á einar fimm milliónir krónur.

### Lønarlækking

Størstu útreiðslurnar í fótbóltsfeløgum eru lønirnar. Tí er tað í lønunum, at skerjingarnar skulu gerast, um tær skulu muna nakað.

Sambært Norðlýsinum í Molde – tað eitur Romsdals Budstikke – fáa spælararnir í Molde millum tvey hundrað túsund og eina millión krónur í løn um árið. Sama blað veit at siga, at leiðslan í felagnum hevur heitt á spælararnar um at fara tíggju prosent niður í løn ella í alt 1,5 milliónir um árið. Blaðið veit eisini at siga, at felagið hjá spælarunum hevur verið uppi í leikinum, og at umboð fyri felagið hava tosað við spælararnar – ein og ein – fyri at lodda dýpið, hvønn hugburð teir hava til uppskotið um lønarniðurskurð. Enn er ikki greitt, hvat fer at spyrjast burturúr.

Jákup Mikkelsen váttar, at talan hevur verið um lønarlækking, og at hann og hinir spælararnir eru spurdir um, hvat teir siga til uppskotið, men hann vil einki meiri siga um hetta uttan tað, at hann roknar við at vera í felagnum inntil síðst í november, tá ið sáttmálaskeiðið verður runnið.

Molde venjarin, Gunde Bengtsson, segði fyri viku síðani, at hann hevði ætlanir um at keypa tveir spælarar á landsliðsstøði afturat til felagið. Men hann varð skjótt settur upp á pláss av leiðsluni, sum boðaði frá, at talan fór ikki at vera um at keypa nýggjar spælarar. Venjarin ásannaði, at tað var leiðslan og ikki hann, sum í sovornum førum eigur síðsta orðið, og so helt hann seg hava rætt at leggja afturat, at møguleikin hjá Molde at vera við í stríðnum um gullkrónurnar fór ikki at verða so góður, sum hann kundi havt verið, um felagið hevði havt keypt tveir nýggjar spælarar.

Møguleikin at selja onkrar spælarar og harvið at lætta um lønarútreiðslurnar hevur verið nevndur, men enn eru eingir Molde spælarar seldir. Síðani í heyst eru fimma spælarar farnir úr felagnum. Teir vóru 26, sum stríddust um plássini á besta liðnum. Nú eru teir 21.

# Flaggdagsrenningin

**Eins og undanfarin ár fer Bragdið aftur í ár at skipa fyri renning á Flaggdegnum**

RENNING
*Tíðindaskriv*

Byrja verður við Gamla Apotek kl. 16.00, og er tað beint eftir hugnaliga flaggdagshaldið á Vaglinum í Havn.

Kappingin er fyri børn og vaksin. Gjørt verður vart við, at øll – skjót og minni skjót, ung og eldri – eru vælkomin. Vaksin renna 7,02 km. og børn, fødd í 1990 ella seinni, renna umleið 1,8 km.

Umframt at vera ein kapping fyri einstaklingar – kappingin er tann fyrsta í árligu Grand Prix renningini fyri vaksin – er Flaggdagsrenningin eisini ein kapping ímillum virkir, stovnar o.t., nevnd firmakapping.

Firmakappingin er skipað á tann hátt, at virkini v.m. kunnu tekna 3-5 vaksnar luttakarar á hvørjum liðið, ið so kappast ímóti hvørjum øðrum. Fleiri lið kunnu luttaka frá hvørjum virki, tó skulu kvinnur og menn luttaka á hvør sínum liðið.

*Dreingir*
– føðiár frá og við 1990-1996, renna 1,8 km.
*Gentur* –
– føðiár frá og við 1990-1996, renna 1,8 km.
*Kvinnur*
– føðiár frá og við 1958-1989, renna 7,02 km
*Menn*
– føðiár frá og við 1958-1989, renna 7,02 km
*Veteranar kvinnur*
– føðiár til og við 1957, renna 7,02 km
*Veteranar menn*
– føðiár til og við 1957, renna 7,02 km

Eftir at komið er á mál fáa allir luttakararnir frugt, Poptop og Restorffs sodavatn.

Vinnandi lið og einstaklingar fáa steyp til ognar. Harumframt letur Føroya Shell heiðursmerkir til tríggjar teir fremstu rennararnar.

Luttøkugjaldið til kappingina er 60 kr., og gjørt verður vart við, at luttakararnir skulu melda til í góðari tíð, og ikki á staðnum beint undan kappingini.

### Rundir dagar

Hetta er 17. Flaggdagsrenning og sum nakað nýtt verður farið undir at heiðra tey, sum hava luttikið 10 og 15 ferðir í hesi kapping. Sambært okkara skrásetingar eru tað higartil 2 í hava luttikið 15 ferðir og 11 í hava luttikið 10 ferðir.


*Vanliga hevur flaggdagsrenningin stóra undirtøku, og árið í ár man neyvan verða nakað undantak í so máta*

## Tey bestu

**Yvirlitið niðanfyri sýnir bestu tíðirnar, sum luttakararnir hava fingið í tíðarskeiðinum 1990-2000**

**Bestu tíðirnar, menn**

| | Fornavn | Eftirnavn | Felag/ Staður | min. | sek. | Ár |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hallur | Holm | Bragdið | 22 | 56 | 1993 |
| 2 | Guttorm | Sørensen | | 22 | 58 | 2001 |
| 3 | Bogi | Lenvig | | 22 | 59 | 2002 |
| 4 | Niels Jákup | Jakobsen | Bragdið | 23 | 45 | 1991 |
| 5 | Hjalti | Gunnarstein | Bragdið | 23 | 56 | 1992 |
| 6 | Óli | Olsen | Bragdið | 23 | 59 | 1991 |
| 7 | Sølvi Reinert | Hansen | Roysnið | 24 | 5 | 1999 |
| 8 | Freddie | Poulsen | Bragdið | 24 | 7 | 1993 |
| 9 | Ole | Kragh | | 24 | 11 | 1993 |
| 10 | A. Marni | Joensen | Bragdið | 24 | 15 | 2000 |
| 11 | Regin | Joensen | Tórshavn | 24 | 20 | 1991 |
| 12 | Eyðun | Hjalt | | 24 | 47 | 2001 |
| 13 | Cecil | Weihe | | 25 | 2 | 2001 |
| 14 | Dia | Jacobsen | Bragdið | 25 | 4 | 1998 |
| 15 | Bogi | Olsen | Roysnið | 25 | 8 | 1998 |
| 16 | Absalon | Hansen | Bragdið | 25 | 17 | 1990 |
| 17 | Rúni H. | Olsen | Bragdið | 25 | 20 | 1999 |
| 18 | Jan | Smallward | | 25 | 22 | 2001 |
| 19 | Regin | Joensen | Tórshavn | 25 | 27 | 1992 |
| 20 | Bjørn | Kunoy | Bragdið | 25 | 32 | 1992 |

**Bestu tíðirnar, kvinnur**

| | Fornavn | Eftirnavn | Felag/ Staður | min. | sek. | Ár |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Annemette | Aagaard | | 26 | 28 | 2001 |
| 2 | Sunneva | Bjarnastein | Bragdið | 27 | 32 | 1999 |
| 3 | Rigmor N. | Joensen | Bragdið | 28 | 6 | 2000 |
| 4 | Thorid | Wester-Andersen | Danmark | 29 | 41 | 1992 |
| 5 | Tordis | Debes | Bragdið | 30 | 5 | 2000 |
| 6 | Katrin | Sørensen | | 31 | 30 | 2002 |
| 7 | Jana | Jacobsen | Miðvágur | 31 | 37 | 2000 |
| 8 | Jóngerð | Høgnesen | Tórshavn | 32 | 9 | 1991 |
| 9 | Gurðun | Poulsen | Tórshavn | 32 | 39 | 2000 |
| 10 | Anna Herup | Høgnesen | | 33 | 0 | 2002 |
| 11 | Eva | Olsen | | 33 | 3 | 1996 |
| 12 | Lív | Sørensen | Tórshavn | 33 | 8 | 1999 |
| 13 | Gunnvá | Egholm | Bragdið | 33 | 25 | 1998 |
| 14 | Rannvá | Hanusardóttir | Bragdið | 33 | 29 | 2000 |
| 15 | Ann | Thomsen | Tórshavn | 33 | 51 | 2000 |
| 16 | Karin | Gaardlykke | | 34 | 0 | 2002 |
| 17 | Beinta Hoydal | Joensen | | 34 | 1 | 2002 |
| 18 | Randi | Kúrberg | Tórshavn | 34 | 10 | 1991 |
| 19 | Randi Dam | Petersen | Tórshavn | 34 | 19 | 1998 |
| 20 | Óluva | Zachariassen | | 34 | 32 | 2001 |




## Til sølu



Sethúsini Tróndargøta 16, Tórshavn, verða við hesum lýst til sølu.

Húsini verða nýtt til umsitingina hjá Havnar Handverkarafelag, og húsini eru eisini innrættaði til sama endamál.

Talan er um eini eldri, smærri og vælhildin sethús. Móti eystri er urtagarður. Ein leyst standandi garaga er á stykkinum út ímóti Magnus Heinasonargøtu. Hon treingir til eina hjálpandi hond.

Húsini eru innrættaði soleiðis:

Stovuhædd: Inngongd, lítið wc, stórt rúm íroknað køkur.

Loftahædd: Eitt stórt fundarhøli.

Kjallari: Lágur kjallari við betonggólvi.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Advokatskrivstovan, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, att. Óla Jákup Kristoffersen, e-mail: ojk@advlaw.fo ella Elin Svínoy, e-mail: els@advlaw.fo

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøta 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145

FRAMSÝNING 2003
Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Listaskúlin hava framsýning í EYSTURSKÚLANUM
Leygardagin 12.apríl kl. 14.00 – 19.00
Sunnudagin 13.apríl kl. 14.00 – 19.00

Eisini verður tónleikur og kórsangur

EYSTURSKÚLIN
Leygardagin:
Kl. 15.00 Havnar Hornorkestur – Lærari: Ove Olsen
Kl. 16.00 Kór - Ung Stjørnuskot – Lærari: Sigrið Sivertsen
Kl. 17.00 Messing - Unglingaorkestið – Lærari: Kenneth Jones
Sunnudagin:
Kl. 15.00 GHM - Harmoniorkestur – Lærari: Andrea Heindriksdóttir, Oddur Hentze, Kenneth Jones
Kl. 16.00 Musikkspælistova - sangur/dansur – Lærari: Sigrið Sivertsen
Kl. 17.00 Sangur - Eyð og Barbara – Lærari: Sigrið Sivertsen

Høvi verður at keypa kaffi og køkur
(Eisini verður tombola)

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli


HÚS Á TVØROYRI
( Í VALINUM )
Um hóskandi boð fæst, eru eini nýumvæld sethús til sølu.
Tlf. 25 55 61

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Trygdarskógvar
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Snøggir trygdarskógvar av týskari góðsku. Uttan iva teir bestu í landinum
8 ymisk sløg á goymslu
Vit hava trygdarútgerð til øll endamál
Skeltir til allar uppgávur!
Handskar til øll endamál
Sosialurin 311820

**Frá Kappróðrarfelagnum N.S.Í.**

Aðalfundurin verður í Kappróðrarneystinum mánakvøldið 28. apríl 2003 kl. 19.30. Skrá samb. lógum felagsins.
Um aðalfundurin ikki er viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.

**Kappróðrarfelagið N.S.Í.**